# Pedagogur

ENDURLÝSING

**Dagrøktarskipanin søkir eftir pedagogi til spælistovuna á Argjum.**

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum í góðum umhvørvi.

**Arbeiðið**
fevnir m.a. um at skapa tryggar og mennandi umstøður í spælistovuni fyri børn, dagrøktarar og foreldur, ið eru knýtt at økinum.

**Vit ynskja**
at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið, kann arbeiða sjálvstøðugt, ert virkin, røkin og hevur lætt við at samstarva.

At tú hevur hug og áræði at skapa umstøður har børnini gleðast, trívast og mennast.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, dagrøktarleiðara, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman viðmælum og upplýsingum um úbúgving og royndir, skulu vera Dagrøktarskipanini, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. august 2000. Merk umsóknina "spælistova".

Tórshavnar kommuna

# Starvsfólk til barnaansingarstovnin við Kjalarvegin

Treytað av, at loyvi fyriliggur, hevur Kl. Býráð gjørt av at seta á stovn ein nýggjan barnaansingarstovn í bygninginum við Kjalarvegin 30, sum nú verður innrættaður til endamálið. Stovnurin fatar um ìalt 13 størv, sum her verða lýst leys at søkja. Stovnurin kemur at ansa 48 børnum í aldrinum 0-7 ár við vøggustovu og barnagarði, har dentur verður lagdur á:

- heimligan hugna og trivna fyri bæði børn, foreldur og starvsfólk
- røttu karmarnar í einum nútímansgjørdum húsum við øllum neyðugum innbúgvi og amboðum

## Leiðari

**Høvuðsuppgávur:**

- at hava leiðsluna og ábyrgdina av stovninum
- at samskipa arbeiðið á stovninum
- at skapa trivna á stovninum
- at samskipa skeiðvirksemi hjá stovninum
- at samskifta við almennar myndugleikar

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**

- kann ganga á odda og dugir væl at fyrisita/leiða
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og myndugleikar
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- er fleksibul
- sær møguleikar fram um mørk
- ger brúk av sínum eygleiðaraevnum
- er opin fyri nýhugsan

**Útbúgving/royndir:**

- námsfrøðiliga útbúgving

Royndir innan leiðslu og umsiting kunnu vera ein fyrimunur

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

## Starvsfólk

**Vit sóknast eftir persónum, ið:**

- eru fleksiblir
- hava eitt opið sinni
- síggja møguleikar fram um mørk
- taka støði í barninum
- taka barnið í álvara
- gera brúk av sínum eygleiðaraevnum
- eru opnir fyri nýhugsan
- leggja stóran dent á eitt gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar

**Størvini at søkja eru:**

- 1 pegagogur (varaleiðari), 40 t/viku
- 1 pedagogur, 32 t/viku
- 1 pedagogur, 30 t/viku
- 5 hjálparfólk, 30 t/viku
- 1 hjálparfólk, 22 t/viku
- 3 hjálparfólk, 20 t/viku

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

- Varaleiðarin, lønarstig 17-23
- Pedagogar, lønarstig 16-22
- Hjálparar, lønarstig 9-15

Ætlanin er, at stovnurin letur upp 1. oktober 2000, tó við fyrivarni fyri møguligum seinkingum, og verða størvini sett frá hesum degi.

Meir fæst at vita við at venda sær til býráðsskrivstovuna, telefon 456388.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Klaksvíkar Kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. august 2000 á miðdegi.

**Klaksvíkar Býráð**

Føroya største úrval av
**PAKKITILFARI**
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:

* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

**FARPACK**

*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*

**www.wenzel.fo**

Ford

fk **Matseðilin**

*Rætting*

Mánadagin 31. juli:
**Kjøtfrikadellur**

Týsdagin 1. aug.:
**Karbonatur**

Mikudagin 2. aug.:
**Grýturættur**

**Kostnaður 32,- kr.**

**Hósdagin 27. juli er opið til kl. 18. Ólavsøkuaftan er stongt**

***Matstovan í Hoyvík***

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

**Skorsteinssóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

**Jimex Brenniovnar**
**Isokern Skorsteinsbjálving**
**Isokern Skorsteinselementir**
**Lúkur - Fuglaristir**
**Ventilar - Roykhattar**

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

**SÚKKLUHANDILIN Í KOLLAFIRÐI**

***TILBOÐ***

**Italsk kappsúkkla »Carraro« útgjørd v/ Campagnolo-Avant 16 gear, stell H. 57 V. 9 kg EINANS 5.375,- kr.**

***Søla og umvælingar***
Góðk. súkklumek.

**Tlf./Fax 421511**

# Eysturoyar Gongufelag/ kunningarstova

Gongutúrurin sunnudagin er útsettur til 06.08.2000 – Góða ólavsøku.

**sosialurin sosialurin sosialurin -har tað hendir**



# Sethús

**Grønlandsvegur 14, Tórshavn,**

**til sølu**



Húsini eru í trimum hæddum, hvør hæddin 90 m². Á loftinum er stova, 5 kømur, lítil køkur og gongd. Í miðhæddini er stór stova, spísistova, køkur við spískamari, eitt kamar, baðirúm og gongd. Kjallarin óskildraður.

Grundøki 572 m². Gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð. Byggiár fyrst í 50-árunum.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað vendið sær til

**Óli Mikkelsen,** tlf. 314080
**Eyðleyg Hansen,** tlf. 313423

# Nýggj sól



Vit hava nú sett eina nýggja Ergoline sól upp við 44 – 160 w rørum og 5 andlitsperum.

Hesa vikuna hava vit opið alt samdøgrið.

**Sólin Millum Gilja**
Tlf. 319848



**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum • 370 Miðvágur Tlf. 332600 Fax 332603**

# Sjúkrasystir

Lýst verður eftir sjúkrasystir 0,46 tíð at byrja 15. oktober ella eftir nærri avtalu.

Møguleiki er at fáa meiri arbeiði í komandi ári.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Umsóknarfreistin er 1. september og verður at senda til:

Stýrið fyri Ellis- og Avlamisheimið
í Vágum
370 Miðvági

STARV sosialurin

# Blaðfólk til Sosialin

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er ein partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi,og har tú allatíðina fært nýggjar og spennandi uppgávur. So er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Vit hava brúk fyri blaðfólki frá 1. september. Vit bjóða hendingarrík og fjølbroytt starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, at tú fylgir við í tí, sum hendir og rørist í samfelag okkara, og tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til teldur.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru allatíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 14. august:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

*Hevur tú hug at frætta nærri um okkara tilboð, kanst tú venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra á telefon 216409*

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast í dag uml. 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.

# Kollafjarðar Kommuna

Kommunuskrivstovan er stongd frá mánadegi 31. juli til og við fríggjadagin 18. august vegna summarfrí.

**Kollafjarðar Kommuna**

# Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. $19^{00}$ til $21^{00}$

**☎ 212380**

# Skrivari/ málsviðgeri

**Endurlýsing**

**Til trivnaðarfyrisitingina, sosialu deild verður søkt eftir skrivara/málsviðgera at byrja skjótast tilber.**

**Høvuðsuppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá másviðgeranum/skrivaranum hjá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum eru:

- At skriva fundarskráir og fundarfrásagnir
- Fyrireika, geva boð og skipa fyri, tá fundir eru
- Edv-skráseta útgjaldingar eftir forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini, sum kommunan skal hava endurgoldið
- Saman við skrivaranum hjá barnaverndarnevndini at hava eftirlit við og avstemma konti hjá sosialu deild
- Ymiskar málsviðgerðaruppgávur

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving. Skal hava kunnleika til bókhald, tekstviðgerð og rokniark á brúkarastøði. Skal duga føroyskt til lítar.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 15. lønarflokki sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvsog tænastumannafelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi íseinasta lagi 14. august 2000. Merk umsóknina "skrivari".

Tórshavnar kommuna

# Sumbiar Kommuna

Ætlanin er at seta barnaansing á stovn í Sumbiar Kommunu, um tørvur er á barnaansing.

Umsóknir um ansingarpláss skulu vera Sumbiar Kommunu í hendi áðrenn 15. august 2000.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba

*Lýsið í* **sosialinum**